# KARAVANFERIA Í SKOTLANDI – BEINT VIÐ STRONDINA

FRÁFERÐIR 16.06 OG 18.08





Karavandepilin í Grannie's



Isley karavan



Stutt til Inverness

Frálíku karavanfrítíðardeplarnar „Grannie's Heilan Hame" og „Nairn Lochloy" eru sera góðir til barnafamiljur. Deplarnir hava Treetops Grove Kids Club, har børnini kunnu tekna, dansa, syngja, spæla spøl og verða við í ymsum kappingum. Tætt við frítíðardeplarnar eru møguleikar at sigla við kano, ríða, spæla golf og mangt annað. Loch Ness er tætt við, og eyðsýnt er at vita, um tit síggja víðagitna ódjórið „Nessie". „Monster Activties" stuttleikaparkin er eisini nærindis og har er ein ørgrynna av spennandi upplivingum, so sum rafting og at flúgva við flogskíggja. Sí meira á www.monsteractivities.com. Ein túrur til Inverness tekur ikki langa tíð. Í egnum bili eru møguleikarnir nógvir, og tit avgera sjálv.

## GRANNIE'S HEILAN HAME

Grannie's frítíðardepilin nærindis Dornoch liggur slakar 2½ tíma frá Scrabster. Beint við liggur snjóhvít strond, har børn og vaksin kunnu spæla sær í tímar. Á deplinum er eisini svimjihylur, spælipláss, matstovur, handil, stórt spælirúm og pubb. Karavanbygdin er uml. 10-15 min. við bili frá hugnaliga býnum Dornoch.

### 9 NÆTUR FYRI 2 VAKSIN + 2 BØRN (5-12 ÁR)

**KR. 8.460,-**

*Umborð: Gist verður í familjukamari uttan vindeyga og við 4 koyggjum og vc/bað. Á frítíðardeplinum: Gist verður í karavan „Carron" við 4+2 seingjarplássum.*

## NAIRN LOCHLOY HOLIDAY PARK

Frítíðardepilin í Nairn er einans 3 tímar úr Scrabster. Har finst alt, sum krevst til eina góða familjuferð. Bara ein minutt frá karavanbygdini liggur tann stóra, snjóhvíta sandstrondin – ein sannur fongur fyri børnini! Svimjihylur, spælipláss, handlar, mat stovur og pubbir eru eisini á staðnum. Karavanbygdin er bara 2 minuttir til gongu frá hugnaliga býnum Nairn.

### 9 NÆTUR FYRI 2 VAKSIN + 2 BØRN (5-12 ÁR)

**KR. 9.715,-**

*Umborð: Gist verður í familjukamari uttan vindeyga og við 4 koyggjum og vc/bað. Á frítíðardeplinum: Gist verður í karavan „Isley" við 4 + 2 seingjarplássum.*

Íroknað kostnaðin: Tórshavn – Scrabster fram og aftur í bláari/reyðgulari fráferð 16.06 og 18.08 í kamari uttan vindeyga og við wc/bað + 1 bil (upp til 1,9 m høgur, 5 m langur og 2 m breiður) + uppihald í 1 viku í omanfyri nevndu karavan. Avgreiðslugjald, á kr. 60, fyri hvønn, oljugjald, á kr. 25, fyri hvønn og orkugjald, er íroknað prísin.

SMYRIL LINE · J. BRONCKS GØTA 37 · P.O. BOX 370 · FO-110 TÓRSHAVN
TEL +298 34 59 00 · FAX +298 34 59 50 · OFFICE@SMYRIL-LINE.FO

SMYRIL LINE – EXPLORERS OF THE NORTH ATLANTIC

DANMARK · NOREG
ÍSLAND · SKOTLAND
CRUISE

WWW.SMYRIL-LINE.FO